# Jákup vandi venjararnar

**Leygardagin varð skeið hildið í ÍSF húsinum, har Jákup Mikkelsen og málmansvenjari hansasra høvdu skeið fyri venjarum um málmansvenjing**

VENJING
*Jákup Mørk*

Skeiðshølið uppi á loftinum í ÍSF var at kalla á tremur, tá Jákup Mikkelsen og Svend Knudsen fóru undir venjaraskeiðið, sum man vera eitt hitt fyrsta av sínum slag her á landi.

Venjaraskeiðini her á landi hava nú í nógv ár verið fleiri í tali, og einki er at ivast í, at hetta hevur givið føroysku venjarunum eitt nógv hollari støði at hava venjingar útfrá, men hinvegin hevur millum lítið og einki verið gjørt við serstaka fyribrigdi, sum málmansvenjingin er.

Skeiði var komið í lag, eftir at FSF um jóltíðir setti seg í samband við Jákup, fyri at vita, um møguleiki var fyri hesum. Jákup visti av, at venjari hansara, Svend Knudsen, áður hevði tosað um at fara eina ferð til Føroya, og nú, góðar tríggjar vikur eftir, varð skeiðið longu veruleiki.



*Saman við Jákupi Mikkelsen hevði málmansvenjarin hjá Herfølge, Svend Knudsen, um vikuskiftið skeði í málmansvenjing fyri føroyskum venjarum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Nógvir smálutir

Tá vit eftir skeiðið prátaðu við føroyska landsliðsmálverjan, var hann eisini samdur í, at hetta so avgjørt er eitt øki, sum ov lítið hevur verið gjørt við her heima.

Hinvegin er hann eisini greiður um, at tað ikki bert er ein spurningur, sum eigur at verða settur til einstøku venjararnar.

– Málmansvenjingin er ein partur av venjingini, sum víkir somikið nógv frá restini, at tað nærum ikki kann gerast við sama venjara. Hesin hevur jú gjarna eitt lið at hugsa um frammanundan, so tíðin røkkur ikki til hjá honum. Har umframt eru tað heilt aðrir lutir, sum gera seg galdandi í málmansvenjingini, og tí er neyðugu førleikin til hetta ofta ikki til staðar, sigur Jákup.

Hann vísur í hesum sambandi á, at tað eru nogvir smálutir, sum eru broyttir í málmansspælið hansara, síðani hann fyri sjey árum síðani slapp at venja við serstøkum málmansvenjara. Hann dugir ikki at seta tøl á, hvussu nógv betri hann er vorðin av at spæla í Danmark, men leggur aftur dent á, at tað eru nógvir smærri lutir, sum eru betraðir, og sum samanlagt hava gjørt hann betri.

– Tað eru somikið nógvir smálutir í málmansspælinum, sum ein venjari kanska als ikki leggur merki til, men sum ein málmansvenjari leggur seg eftir at síggja og betra. Tað eru kanska bara fetini, sum verða tikin, tá ein bjarging verður gjørd. Onnur halda kanska, at tað er í lagi bara bjargingin er har, men hinvegin er umráðandi, at hon verður gjørd á rættan hátt. Hon skal jú rigga hvørja ferð. Teknikkurin er so máta avgerandi hjá okkum, tí í lutum sum loftiteknikkur og líknandi hava vit ikki loyvi at kiksa.

– Eisini mentalt er talan um heilt aðra venjing hjá málverjanum í mun til aðrar spælarar. Vit skulu alla tíðina vera klárir, hóast vit ikki alla tíðina eru við í spælinum. Vit kunnu ikki, sum útileikararnir kunnu, arbeiða ella takla okkum inn í dystin. Har er kontant avrokning hvørja ferð, og tað krevur so aðrar eginleikar, enn teir hjá útileikarum.

### Tiltrongt

Júst tí venjingin og einstøku lutirnar innan málmansstarvið eru so serstakir, heldur Jákup eisini, at best hevði verið, um tað vóru fyrrverandi málverjar, sum vórðu uppaldir til málmansvenjarar.

– Hesir duga nógv betri at seta seg inn í støðuna hjá málverjunum, og duga tí eisini betri at síggja, hvørjum lutum arbeiðast skal við.

Hann ivast ikki í, at hóast talan ikki var um so nógvar málverjar, sum um vikuskiftið vóru á skeiðnum, so er hetta eitt stig á røttu leiðini, um støðið á málverjunum skal betrast.

– Eg havi eisini fingið tað fatan, at hetta er eitt øki, sum FSF ætlar sær at gera meira burtur úr framyvir, og tað er so avgjørt neyðugt. Eisini fyri at gera komandi landsliðsmálverjarnar betri førar fyri at átaka sær ta uppgávuna. Jens Martin og eg eru báðir komnir eitt sindur upp í árini, so tað verður ikki í allar ævur, at vit koma at standa í málinum, sigur Jákup at enda.

# Fáa teir gomlu við

**Ein av luttakarunum á skeiðnum um vikuskiftið var GÍ-venjarin, Johan Nielsen. Hann heldur, at venjarar sum heild ikki hava nóg gott innlit í málverjastarvið**

MÁLVERJAR
*Jákup Mørk*

Tá tosað verður um føroyskan fótbólt og føroyskar venjarar, so er neyvan nakar, ið hevur drúgvari royndir á økinum enn núverandi GÍ-venjarin, Johan Nielsen.

Hann taldist sjálvandi eisini millum luttakararnar á skeiðnum leygardagin, og hann er eisini samdur við landsliðsmálverjanum í, at málmansvenjingin er eitt øki, sum ikki verður gjørt nóg nógv við her heima.

### Teir royndu skulu við

Hann vísur á, at hetta er eitt somikið serliga øki, sum ov fáir venjarar hava fortreytir fyri at átaka sær, men kortini dugur hann so avgjørt at síggja fyrimunir í einum slíkum skeiði.

– Hetta gevur okkum so avgjørt nakrar nýggjar impulsir sum venjarar, men skulu vit koma rættiliga víðari í hesum, er tað neyðugt, at vit eisini fáa teir eldru málverjarnir við í hesum. Vit hava jú fleiri fyrrverandi málverjar, sum so avgjørt eru egnaðir til uppgávuna, og tí ræður um at fáa hesar við.

Spurdur um tað ikki eisini er ein spurningur um orku til at seta enn ein venjara, sigur hann, at tað nýtist ikki at vera hin stóri trupulleikin.

– Mann kundi hugsað sær eina skipan, har feløgini samstarvaðu um málmansvenjarar. T.d. kundu feløgini í ymsu økjunum tikið stig til at fingið fatur á einum venjara, sum so upp á skift vandi málverjarnar í feløgunum, heldur Johan Nielsen.

### Samstarv millum feløg

Annars er hann eisini av teirri fatan, at hetta so avgjørt er eitt øki, sum nógv arbeiði skal leggjast í framyvir.

– Nú eru vit komnir rættiliga langa leið við sjálvari venjaraútbúgvingini, meðan vit ikki enn hava nakra útbúgving til málmansvenjarar.

– Her kundi eg hugsað mær, at FSF nú fór í holt við at útbúgva instruktørar til hesa venjaraútbúgvingina, soleiðis sum vit hava fingið tað í vanligu venjaraútbúgvingini. DBU hevur seinnu árini uppbygt eina líknandi skipan, so tað kundi verið í samstarvi vi teir, at hetta varð gjørt.

Til kunningar kann annars nevnast, at á venjaraøkinum er útbúgvingin gjørd í samstarvi við DBU, og hava instruktørar frá danska fótbóltssambandinum í fleiri ár verið fastir gestir í Føroyum, har teir hava havt skeið fyri ymsu venjarunum.

Sum nevnt, so heldur Johan tó, at tað týdningarmesta í øllum hesum er, at vit fáa fatur á gomlu málverjunum.

– Flestu venjararnir eru fullgreiðir um, hvussu støðurnar úti á vøllinum taka seg út, men sæð frá málverjasessinum er støðan kanska ein heilt onnur, og tí er neygugt við persónum, sum kenna til sessin, at átaka sær uppgávuna, sigur Johan Nielsen at enda.

*ohan Nielsen heldur tað vera av avgerandi týdningi, at vit fáa røttu persónarnir inn í myndina, um vit skulu røkka nóg langt við málmansvenjingini*





*Framhald av síðu 16*

teimum, sum frammanundan hava lægstu lønirnar, at fáa eina rímuliga lønarhækking.

Tað er eisini ivasamt um talan her ikki er um brot á kommunala sjálvstýrið, soleiðis sum hetta er staðfest í grundlógini, tí við ásetingini um at allir sáttmálar skulu góðkennast av Fíggjarmálastýrinum er samráðingarheimildin í veruleikanum tikin frá kommununum, hóast tað eru kommunurnar, sum gjalda útreiðslurnar, sum standast av hesum sáttmálum.

Vit fara tí við hesum at heita á politiska myndugleikan um at taka stig til at lønardeildin ikki framyvir fær heimild at leggja seg út í sáttmálar, sum privatu fakfeløgini og kommunurnar gera um teir starvsbólkar sum limir eru í privatu fakfeløgunum.

**Samandráttur**

Samanumtikið kunnu vit vísa á, at lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum við landsstýrismanninum á odda miðvíst hevur roynt at forða fyri, at limirnir hjá Føroya Arbeiðarafelag hava fingið sømulig lønar- og setanarkor, men vit skulu gera púrasta greitt, at vit ikki fara at góðtaka slíkan ágang móti fakfelag okkara og limum felagsins.

Sum vit hava nevnt frammanfyri, so hava vit eisini staðfest beinleiðis brot á grundleggjandi fyrisitingarligar reglur um líka viðgerð av borgarum landsins, og tí hevur lønardeildin og Fíggjarmálastýrið so dyggiliga avdúkað seg sjálvan í hesari ótespiligu herferð móti felag okkara.

Felag okkara hevur stundum alment víst á tørvandi virðingina, sum bæði lønardeildin og landsstýrismaðurin hava víst mótvegis fakfeløgunum, og hetta kann sjálvsagt hugsast at vera ein av orsøkunum til tann ágang, sum Føroya Arebiðarafelag og limir okkara hevur verið fyri frá almennari síðu.

Vit vóna, at politisku flokkarnir duga at síggja hendan ágang sum framdur er, og at hesir flokkara taka stig til at forða fyri framhaldandi ágangi móti føroysku fakfelagsrørsluni.

Vit skulu gera Fíggjarmálastýrinum púrasta greitt, at vit fara ikki at bakka fyri hesum ágangi, og vit vilja hava staðfest tey løgfrøðiligu brotini, sum stýrið hevur framt á m.a. vanligar fyrisitingarligar reglur.

Δ

## VIÐMERKINGAR

# Pan Fish

**Bill Justinussen**

**Fornermaður útlendskur kapitalur**

Royndin at fáa fingrarnar í krúnuni á føroyska vinnulívinum, Havsbrún, miseydnaðust. P/f Varðin seldi sín partapening aðrar vegir, og ognin var varðveitt á føroyskum hondum. Áhugavert var at hoyra viðmerkingarnar frá stjóranum í Pan Fish, tá hesin mátti staðfesta ósigurin: So byggja vit bara eina nýggja fóðurverksmiðju á norska vesturlandinum at kappast við Havsbrún. Síðani varð fráboðað, at føroysku alibrúkini, sum Pan Fish eigur í, einaferð í framtíðini koma at keypa fóður frá norsku fóðurfram-leiðarunum heldur enn frá Havsbrún.

**Skúladømi**

Hendan framferð er eitt skúladømi um, hvussu væntast kann, at útlendskur kapitalur kemur at seta dám á føroyskt vinnulív. Um Pan Fish ger, sum teir í vikuni boðaðu frá, kann turt staðfestast, at í hesum føri vil útlendskur kapitalur, so sum fleiri hava ávarað ímóti, minka um virksemið í føroysku vinnuni. Við sínum ætlanum um at keypa fóður úr Noreg heldur enn úr Føroyum, sum teirra ”føroysku” alibrúk enn gera, koma teir at flyta arbeiðspláss og inntøkur úr føroyskum vinnulívi til Noregs. Og sjálvt um Havsbrún eru og verða kappingarførir, vil tað ikki fáa ”føroysku” alibrúkini hjá Pan Fish at keypa føroyskt fóður. Og um fóðurprísurin í Pan Fish-fyritøkuni í Noreg verður tvífaldaður, vilja teir framvegis keypa úr Noreg, tí eigarin er hin sami aftanfyri, og sostatt liggur samlaði vinningurin í somu lummum, tá avtornar. At vit føroyingar missa nøkur arbeiðspláss og nakrar inntøkur, og landskassin missir skattainntøkur, gerst bara ikki við, tí útlendski kapitalurin hevur so ”mennandi” ávirkan á føroyskt vinnulív, verður sagt.

**Hvar fer útlendski kapitalurin**

Spurningurin er: Hvar endar tann útlendski kapitalurin, sum verður investeraður í Føroyum. Higartil má ásannast, at fyri ein stóran part endar hann í lummunum á partaeigarum, sum selja síni partabrøv og harvið fara burtur úr vinnuni. At selja partabrøv fyri yvirkurs kemur í nógvum førum ikki vinnuni tilgóðar. Um t.d. Pan Fish hevði keypt partabrøvini í Havsbrún, hevði hesin peningur ikki komið Havsbrún tilgóðar, men einans partaeigarunum, sum fara burturúr. Og tá Pan Fish og aðrir útlendingar hava keypt partabrøv í føroyskum alibrúkum, eru alibrúkini ikki vorðin ríkari, men teir privatpersónar ella feløg, sum einaferð settu partapening í feløgini. Og tann peningurin verður neyvan brúktur í alibrúkunum.

**Hvørji áhugamál hevur kapitalurin**

Tað er sjálvsagt, at ongin útlendingur hevur áhuga í at seta pening í føroyska vinnu, uttan so er, at hann sær fyrimunir við tí. Fyrst og fremst avkast, síðani rættindi og avgerðarrætt. Tí fara teir eftir partabrøvum, tí hesi geva ognar- og avgerðarrætt. Og tá kapitalurin hevur eina uppgávu, nevniliga at vaksa og gerast størri, spyr hann ikki eftir áhugamálum føroyinga. Um hann ein dag sær fyrimunir í at flyta ella niðurleggja t.d. eina alifyritøku, tí okkurt annað loysir seg betri, ella orsakað av innanhýsis kapping, ger hann tað uttan himpr.

**Ein ítøkilig ávaring**

Framferðin hjá Pan Fish skuldi sagt okkum, at neyðugt er at vera á varðhaldi. Ein fíggjarligur risi hevur ongar trupulleikar at gjalda 100 ella 200 milliónir ov nógv fyri eina fyritøku, um tað tænir teirra endamáli. Og Pan Fish er neyvan einasta dømi. Føroyar eru eitt sera áhugavert landafrøðiligt øki, tí umhvørvið er heimsins reinasta, og vit liggja fjart frá næstu strond. Skaparin hevur givið okkum stórar dýrgripir, sum vit eiga at umsita við skynsemi og ikki avreiða fyri løtuvinning. Okkara forfedrar lótu okkum landið til láns, ta tíð, vit eru uppi á døgum, og okkara skylda er at lata tað víðari til okkara børn í sama ella betri standi.

Tíðindaskriv frá »Grindamannafelagnum«

# Skipa fyri grindafundum

Nú veturin eftir álmanakkanum er farin at halla, og fyrsti várdagur er í nánd, fer "Grindamannafelagið" undir sína kunnandi fundarrøð í teimum økjum, vit ikki vóru í fjør – Suðuroynni, Sandoynni og Suðurstreymi.

Men fundarrøðin byrjar í Vágum, og tað hevur sína orsøk. Í juli-mánaði í fjør var ein grind hildin til í Sandavági, merkt við fylgisveinasendara og síðani rikin út aftur. Dagarnar aftaná kundu tey, sum høvdu áhuga, fylgja teimum merktu hvalunum á heimasíðuni hjá Náttúrugripasavninum. Men tey. sum fylgdu við "grindini", fingu bara at vita, hvar hvalirnir vóru staddir. Alt gott um tað, og eitt av endamálunum við merkingini var eisini at vita, hvussu hvalirnir ferðaðust. Frammanundan vistu vit einki um tað - nú vita vit nakað, men ikki alt. Tað fekst nógv annað burtur úr tí lítlu telduni, sum var innbygd í fylgisveinasendaran. Nú eru hesi data viðgjørd, og vágafólk verða tey fyrstu, sum fáa nakað alment at vita um hetta. Tað eru fólk frá Náttúrugripasavninum, ið greiða frá hesum.

Hini sum verða við í vetur eru: Jústines Olsen, djóralækni og Maria Dam frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Jústines hevur gjøgnum árini fylgt gjølla við og kanna avlíving av grindahvali. Vit eiga altíð at gera okkara arbeiði í grind ábyrgdarfult og lýtaleyst. Jústines fer at greiða frá um avlívingina og annað í samband við grind. Tað verður ongantíð tosað nóg nógv um avlívingina, tí hana síggja øll í einum grindadrápi, og hana er tað hugsað verður um, tá ið spurt verður, hvussu gekst í grindini. Hesin týdningarmikli parturin av arbeiðinum í grind eigur at ganga fyri seg fyrimyndarliga, og eitt av aðalmálinum hjá grindamannafelagnum er júst at kunna um avlívingina og greiða frá henni, soleiðis at føroyingar læra at skera á háls – skjótt og ruddiligt. Aftan á hesa ástøðiligu kunnan er bara at halda seg framat, tá ið grind er, í fyrstani við vegleiðing frá einum royndum grindamanni.

Maria Dam hevur í mong ár kannað føroyskan mat – eisini grind og spik. Hon fer á fundunum í stuttum at greiða frá, hvørji evni eru í hvalaúrdrátti. Men vit eiga at ganga út frá, at grind og spik er góður matur, tí grindahvalurin livir í heimsins reinasta umhvørvi – havinum kring Føroyar. Høvuðstrupulleikin, mannaættin í løtuni hevur at stríðast við, er dálking. Verður einki gjørt við hana, fer mannaættin at doyggja í sínum egna skarni, verður sagt. Men er tað nú so illa statt kortini? Sjálvandi er tað ikki tað. Tað verður veruliga nógv gjørt fyri at minka dálkingina – eisini her á landi. Latið okkum liva í einum reinum landi í reinum havumhvørvi. Landsins grøði fólksins føði.

Vónandi fáa vit eisini eitt gott prát um lokal grindaviðurskiftir á fundunum kring landið.

Fundirnir verða hesir:

Í Vágum hóskvøldið tann 25. januar klokkan 19.30 í skúlaauluni á Giljanesi.

Í Suðuroy hóskvøldið tann 1. februar klokkan 19.30 í Framtíðini í Vági.

Í Skopun hóskvøldið tann 8. februar klokkan 19.30 í Samljóð.

Aðalfundurin hjá "Grindamannafelagnum" verður leygardagin tann 7. apríl í Norðurlandahúsinum. Hetta verður lýst nærri seinri.

